# Javnaðarflokkurin fer upp um 700.000 krónur

**Øll valevnini hjá Javnaðarflokkinum fáa 4.000 kr í part til egna kampanju. Tilsamans fáa tey 120.000, sigur Kristian Magnussen**

VALSTRÍÐ
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Fyrst var tað Sjálvstýrisflokkurin, sum boðaði frá, at tey fóru at nýta 350.000 kr til valstríðið. Í gjárkvøldið boðaði Tjóðveldisflokkurin frá, at tey fóru at brúka 700.000 krónur.

Enn hevur eingin av hinum flokkunum boðað frá, hvussu nógv tey nýta, men á Rás 2 í morgun boðaði Kristian Magnussen, løgtingsmaður Javnaðarflokksins frá, at Javnaðarflokkurin í øllum førum fer at brúka meira enn 700.000 krónur.

Umframt pengarnar til valevnini, so skal flokkurin rinda fyri alla kampanjuna. Vit hava eisini fingið professiónellar tónleikarar at gera orð og lag til eina fløgu, so samlaði kostnaður fyri alt valstríðið fer í øllum førum upp um 700.000 krónur, vísti Kristian Magnussen á



*Kristian Magnussen heldur, at tað er eitt stórt bluffnummar, tá flokkarnir nú boðoð frá, hvussu nógvar pengar teir brúka í valstríðnum. – Har er als einki gjøgnumskygni í kortini, sigur hann*

Kristian Magnussen vísti eisini á, at hann var sera harmur um, at valstríðið er vorðið so amerikaniserað. Hann segði, at hann var einasti tingmaður í Suðurstreymoy, sum var ímóti, at Føroyar gjørdust eitt valdømi. Hann heldur, at tann avgerðin var skeiv, tí tað førir til, at tað vera tey vælbjargaður, tey penur og tey vælútbúnu, sum verða vald, og at valdið í Føroyum verður sentraliserað til miðstaðarøkið.

Kristian Magnussen segði eisini, at hann heldur at hetta við at kunngera útreiðslurnar er eitt bluffnummar, tí als einki gjøgnumskygni er í tí.


# Ikki bara snakk!

*Tá ið eg bleiv landsstýrismaður fyri 4 árum síðani, fekk eg sum uppgávu at útinna tað, ið samgongan hevði niðurfelt í samgonguskjalið á skúla- og mentanarøkinum.*



**Fólkaskúlin!**

Vit settu okkum fyri at eftirmeta frálæruna í fólkaskúlanum. Og hetta bleiv sanniliga gjørt. Vit fingu PISA-kanningina, og sera umfatandi lógarbroytingar eru framdar í tveimum umførum!

- Lærarasetanir lagdar út til skúlarnar
- Enskt flutt úr 5. flokki niður í 4. flokk
- Tímatalið í enskum økt við 3 tímum um vikuna
- Valskeiðið hjá foreldrum í skúlastýrum longt til 4 ár
- Tímatalið til fyrstu árgangirnar hækkað við 16 t/vikuna
- Lands- og støðuroyndir verða nú settar í verk
- Størri krøv sett til próvtøkurnar í 9. flokki
- Royndin í enskum í 9. fl. nú eisini skrivlig
- Næm. kunnu nú býtast í bólkar tvørtur um floksmørk
- Felags lesiætlanir verða nú gjørdar fyri alt landið
- Tilboð kunnu nú veitast atferðartruplum næmingum
- Skjøtil settur á námsfrøðiliga gransking
- Lesiráðgevi settur á Føroya Læraraskúla
- Skúlaleiðarar skulu nú hava leiðsluútbúgving
- Nýggj lóg samtykt um Skúlabókagrunnin
- Fleiri pengar avsettir til bókaútgávu
- Undirvísingarportalur settur á stovn
- Málið um Bókamiðsøluna avgreitt
- Sett er út í kortið at styrkja læraraútbúgvingina

Nei, her er ikki bara snakkað! Av sonnum eru átøk framd, og tey fara at muna. Nú ræður um at halda fram á somu leið. Nógv er eftir at gera. Vit skulu vera á topp-10 listanum í PISA innan fyri 10 ár!

**Jógvan á Lakjuni,**
landsstýrismaður og valevni Fólkafloksins

www.folkaflokkurin.fo


# Tjóðveldið 700.000 krónur til valstríð



*- Eingin sponsorerar Tjóðveldið – tað er eitt prinsipp, sigur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldinum*

**Tjóðveldið kunnger nú sínar útreiðslur til valstríðið. Fyrstur at boða frá hesum var Sjálvstýrisflokkurin. Fyri hesar báðar andstøðuflokkarnar kostar valstríðið góða millión til samans**

VALSTRÍÐ
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Í kjalarvørrinum á skilagóða tiltaki Sjálsvtýrisflokksins um at almannakunngera, hvat flokkarnir nýta til valstríð, skal Tjóðveldið hervið siga frá, at flokkurin sjálvur nýtir til hetta løgtingsvalstríð uml. 480.000 kr.

Hetta sigur Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisins í tíðindaskrivi. Hann sigur víðari, at afturat hesum stuðla økisfeløgini, sum hvørt ár fáa ávísan part av inntøkum floksins, sínum valevnum á ymsan hátt (við plakatum, greinum, tiltøkum o.a.)

- Fyri tey 7 økisfeløgini, ið hava sjálvstøðugan roknskap, hava vit ikki neyvar upplýsingar. Vit meta, at tey nýta í meðal 40.000 kr til hetta valstríðið. Fyri økisfeløgini tilsamans altso uml. 210.000 kr, sigur Høgni Hoydal.

Sostatt nýtir Tjóðveldið tilsamans áleið 700.000 til valstríðið.

- Tjóðveldið fær ikki sponsorpengar frá fyritøkum ella øðrum, og hevur heldur ikki biðið nakran stuðla sær. Tað er eitt prinsipp, sigur Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldinum.